## – Hatta var matchbóltur

**Landsliðvenjarin hjá fótbóltskvinnunum heldur, at nú eiga føroysku kvinnurnar at fáa gullið heim**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Cunningsburgh**: Eftir sigurin á Bermuda er vegurin hjá fótbóltskvinnum til gullið púra opin.

– Hatta var helst matchbólturin í kappingini. Nú eiga vit at kunna koyra hetta heim. Tær oyggjarnar, sum vit nú skulu spæla ímóti, eru munandi veikari enn bæði Áland og Bermuda, sigur Álvur Hansen, landsliðsvenjari.

Hann var illa nøgdur við føroyska spælið í dystinum ímóti Bermuda, men hann ásannaði, at sigurin var tað týdningarmesta.

– Vit spæla ikki væl, og eg eri misnøgdur við spælið hjá okkum í hesum dystinum, men vit hava nógvar streingir at spæla uppá, og vit hava spælarnarir, sum kunnu avgera dystir.

### Meira mótstøða

Á Oyggjaleikunum hesaferð hava Føroyar spælt tveir tættar dystir ímóti Álandi og Bermuda, og hóast Føroyar vunnu báðar dystirnar, so líktist hetta meira gevandi og jøvnum dystum, enn aðrir dystir í kappingin gera.

– Vit hava spælt ímóti tveimum rímiliga góðum liðum, og tað hevur verið spennandi báðar ferðirnar. Undanfarnu ferðirnar hevur tað bara verið í finaluni, at tað hevur verið spennandi, sigur Álvur Hansen.

– Gotland er ikki við hesaferð, men tær hava eisini eitt gott lið, so um Áland, Bermuda og Gotland vóru við næstu ferð, so fingu eitt eina fína kapping.

Mikudagin hevði føroyska liðið frí frá sjálvari kappingini, men tær høvdu eina lætta venjing, og hósdagin og fríggjadagin bíða teir báðir seinastu dystirnir í kappingini, sum eru ímóti Hetlandi og Guernsey.



*Vivian Bjartalíð smekkar til, og bólturin strýkur í netið til 2-0. Dysturin ímóti Bermuda er avgjørdur, og føroysku kvinnurnar stevna beint ímóti triðja Oyggjaleikagullinum á rað*

# Føroyar søktu Bermuda

**Bermuda hevði nógvar kjansir at gera mál, men føroyska liðið hevði yvirvág í spæli, og tá ið Føroyar fingu sínar møguleikar at gera mál, sang bólturin í meskunum. Vinnaramentalitetur og profilar gjørdu munin millum liðini**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Cunningsburgh:** Føroyar verða ikki tiknar í kvinnufótbólti á Oyggjaleikunum í Hetlandi

Tað er niðurstøðan eftir sigrarnar á Álandi og Bermuda seinastu dagarnar.

Føroyska liðið hevur fingið veruliga mótstøðu í hesum dystum, men í báðum førum hevði føroyska liðið munin og vann.

Tað er ikki av tilvild. Tað snýr seg um at hava rættan mentalitet og profilar, sum kunnu avgera dystirnar.

Og tað hevur føroyska liðið.

Hinvegin manglaði Bermuda hetta týskvøldið. Bermuda hevði nógvar góðar spælarar, tekniskt heilt væl fyri, og onkur av teimum skjótur. Men tá ið Bermuda fekk sínar kjansir at gera mál, vóru tær púra eiðasørar. Bæði í fyrra hálvleiki og serliga í seinna hálvleiki hevði Bermuda fleiri púra opnar kjansir, men mál fingu tær ikki.

Ein orsøk til tað var, at føroyski málverjin, Randi Wardum, stóð væl og bjargaði føroyska liðnum í meira enn einari støðu, og hin orsøkin var, at kvinnurnar av Bermuda vóru vánaligir avsluttarar.

### Javnt í fyrra

Dysturin var rímiliga javnur. Føroyska liðið hevði yvirvág í spæli í fyrra hálvleiki, men Bermuda lá fram við, tá ið tær sendu langar bóltar fram á vøllin til tann skjóta álopsspælaran hjá teimum.

Føroyska verjan hevði hóast alt gott tak á henni, men í eina førinum noyddist málmaðurin út at takla uttan fyri brotsteigin.

Føroyar høvdu tveir góðar kjansir at gera mál í fyrra hálvleiki. Fyrst var Malena Josephsen í góðari støðu, men málmaðurin bjargaði, og seint í fyrra hálvleiki kom Sólvá Joensen at standa leys, men hon sparkaði upp um.

Bermuda hevði eitt fríspark, sum brast á tvørstongina og upp um.

### Føroyar fingu málini

Í seinna hálvleiki hevði Bermuda leikliga yvirvág eina løtu, men tá ið tað stóð ringast til hjá føroyska liðnum, skoraði Rannvá Andreassen. Hon sendi eitt fríspark úr 25 metrum høgt móti málinum, og har fór bólturin um mállinjuna, tá ið málmaðurin hjá Bermuda ikki fekk tak á.

Løtu seinni økti Vivian Bjartalíð til 2-0, eftir at Rannvá hevði spælt hana leysa í vinstru. Flata skotið frá Vivian streyk í málið.

Og Rannvá setti sjálv punktum, tá ið hon varð spæld leys og sendi í málið umvegis stólpan.

Bermuda hevði fleiri stórar kjansir at gera mál í seinna hálvleiki, men einki kom burtur úr, og so kundi tað ikki enda við øðrum enn, at føroyska liðið vann tryggan sigur.

### Spæli gjørdist betur í seinna hálvleiki

Leikliga gekk tað ikki serliga væl hjá Føroyum í fyrra hálvleiki. Spælararnir sparkaðu meira, enn teir spældu, og tað skapti einki. Í seinna hálvleiki gjørdist spælið frægari, og tvey av málunum komu eftir framúr góð uppspæl og stikningar í dýpdina.

Vongspælið hjá føroyska liðnum var eitt sindur avmarkað. Vivian Bjartalíð í vinstru kom rættiliga fyri seg í seinna hálvleiki og gjørdist ein hóttan, meðan Ása Dam á Neystabø og Sólvá Joensen í høgru manglaðu seinasta neyvleikan til at fáa nakað burtur úr teirra skjótleika og bóltførleika.

Á sentrala miðvøllinum tók Rannvá Augustinussen eitt ordans tak sum uppruddari, meðan Rannvá Andreassen var profilurin, sum gjørdi avgerandi munin í fram eftir vøllinum. Hon skoraði tvey mál og legði upp til tað triðja.

Verjan fekk seg roynda í hesum dystinum, og tær stóðu seg væl, hóast tær lógu rættiliga frammarliga á vøllinum og harvið spældu við stórari risiko.

Samanumtikið ein uppiborin sigur, tá ið hugt varð eftir leikbýtinum, men skal tosast um opnar kjansir, so átti Bermuda at fingið minst trý mál…

Nú skal ein stór sensatión til, um føroyska kvinnuliðið í fótbólti ikki skal vinna triðja Oyggjaleikagullið á rað.

## FAKTA UM DYSTIN

**Oyggjaleikir, 3. umfar, 12. juli 2005**

**Føroyar-Bermuda 3-0 (0-0)**
**1-0:** Rannvá Andreassen, 53.
**2-0:** Vivian Bjartalíð, 64.
**3-0:** Rannvá Andreassen, 80.
**Føroyar:** Randi Wardum – Sólvá Joensen, Bára Skaale Klakstein, Unn Kragesteen, Asta Magnussen – Ása Dam á Neystabø, Rannvá B. Andreassen, Rannvá Augustinussen, Vivian Bjartalíð – Halltóra Joensen (Jacoba Langgaard, 71.), Malena Josephsen (Rakul Magnussen, 85.)

## STØÐAN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **1. Føroyar** | **3** | **3-0-0** | **12-1** | **9** |
| 2. Bermuda | 3 | 2-0-1 | 13-3 | 6 |
| 3. Áland | 3 | 2-0-1 | 9-4 | 6 |
| 4. Isle of Man | 3 | 1-0-2 | 5-8 | 3 |
| 5. Hetland | 3 | 0-1-2 | 2-11 | 1 |
| 6. Guernsey | 3 | 0-1-2 | 2-16 | 1 |

**Seinastu dystirnir**
14. juli kl. 16.00: Føroyar-Hetland
15. juli kl. 12.00 Føroyar-Guernsey